## Føroysk fernisering og tónleikur í Keypmannahavn

Hósdagin 4. september var fernisering í „Bredgade Kunsthandel“, sum liggur á Bredgade 67-69 í Keypmannahavn. Listafólkini eru: Edward Fuglø, Eyðun av Reyni, Kári Svensson, Olivur við Neyst, Torbjørn Olsen, Zacharias Heinesen, Ingálvur av Reyni, Joensen-Mikines, Jack Kampman og W. Heinesen. Føroyski sendiumboðsmaðurin, Herálvur Joensen, helt fyrst eina røðu, og síðan var livandi tónleikur við Hanusi G. Johansen á gittari og sangi, Páll Sólstein á horn, Hans Petur í Brekkunum á sax, Heiðrun Petersen á violin og Mia Káradóttir á floytu.



*Málningur, ið Eyðun av Reyni hevur málað*

# TAKS sparir uttan at skerja

**Til tess at spara og effektivisera, hevur TAKS framt ymiskar broytingar viðvíkjandi tolleftirlitinum á Flogvøllinum. Men tað merkir ikki, at eftirlitið verður skert á nakran hátt, sigur Kjartan D. Joensen, deildarleiðari á tolleftirlitinum**

TOLLEFTIRLIT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



TAKS hevur seinastu tíðina framt ymiskar broytingar í tolleftirlitinum á flogvøllinum í Vágum. Broytingarnar, talan er um, eru millum annað, at nøkur starvsfólk eru flutt í onnur øki at starvast. Millum annað, so merkir hetta eisini, at kvinnuligir tollarar bert eru til arbeiðis á flogvøllinum aðruhvørja viku, og hetta kundi víst seg at verið stak óheppið, men so er ikki, staðfestir Kjartan D. Joensen, sum er deildarleiðari á tolleftirlitinum hjá TAKS.

Í løgtingslóg nummar 121 frá 23. desember 1991 um toll, stendur í 9. kapittul, §30, at »Tollvaldið hevur rætt til at eftirkanna persónar, ið ferðast til ella frá tolløkinum, sum eru ella hava verið umborð á skipum ella flogførum, ella sum ferðast fram við strondunum, í havnum, á flogvøllum ella atløguplássum.«.

Samstundis stendur eisini í sama kapittuli, §30, stk. 3, at »Eftirkanning, ið ikki bert avmarkast til uttanáklæðini, má bert gerast, tá ið nóg góðar grundir eru til at halda, at viðkomandi hevur nakrar ólógligar vørur uppi á sær v.m., og bert eftir boðum frá ovasta hjáverandi tollyvirmanni. Tann, ið eftirkannaður verður, kann krevja sær vitni at vera hjá undir eftirkanningini. Til eftirkanningina krevst, at tann, ið kannar ella hjástaddur er, skal vera av sama kyni, sum tann, ið eftirkannaður er.«

Hetta merkir so eisini, at tá bert mannligir tollarar eru til arbeiðis á flogvøllinum, hava hesir ikki rætt til at eftirkanna kvinnulig ferðafólk. Men sambært Kjartan D. Joensen, er hetta ikki nakar trupulleiki.

### Spara uttan at skerja

Síðani Vágatunnilin kom í 2002, er vorðið munandi léttari og skjótari at ferðast millum Havn og flogvøllin í Vágum. At tað er blivið somikið skjótari at koyra ímillum, hava tey á TAKS nú valt at gera sær dælt av.

Áðrenn Vágatunnilin kom, noyddust fólk at ferðast við báti um Vestmannasund, og hetta merkti eisini fyri tolleftirlitið, at tey altíð vóru noydd at hava ein mannligan og ein kvinnuligan tollara á flogvøllinum, til tess at kunna halda neyðuga eftirlitið.

Men so er ikki longur. Nú TAKS hevur framt ymiskar broytingar í tolleftirlitinum á flogvøllinum í Vágum, eru kvinnuligir tollarar bert til arbeiðis á flogvøllinum umleið aðruhvørja viku. Men Kjartan D. Joensen staðfestir, at hetta merkir ikki, at tolleftirlitið verður skert, ella at tað er frítt hjá konufólki at smugla inn til landið aðruhvørja viku.

- Broytingarnar merkja ikki at tolleftirlitið verður skert á nakran hátt. Nú er tað blivið nógv skjótari at koma aftur og fram úr Vágum og millum hini tolløkini, og skuldi tað so hent seg, at einki konufólk er til arbeiðis á flogvøllinum, og at eitt kvinnuligt ferðafólk skal eftirkannast, so ber til hjá okkum at senda ein kvinnuligan tollara úr einum av hinum starvsøkjunum, og kunnu vit tá fremja eftirkanningina. Afturat tí, so hava vit jú eisini hundar á flogvøllinum, og hesir uppsnúsa væl rúsevni, um so er at onkur hevur slíkt við í førninginum, og skuldi nakar illgruni verði, so kunnu vit eftirhalda fólki og kalla eyka fólk inn, til tess at hesi kunnu blíva eftirkannaði, vísir Kjartan D. Joensen, leiðari á tolleftirlitinum, á.

# Tveir dagar til Big Bang

**22 milliardir krónur og óttin fyri heimsins undirgangi er prísurin fyri svarið uppá gátuna um alheimin**

VÍSINDI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



Mikudagin fara vísindamenn í undirjarðar CERN-alisfrøðismiðstøðini í Geneve at trýsta á byrjunarknøttin til eina ta størstu vísindaroyndina, sum nakrantíð er roynd. Endamálið við vísindaroyndini er at royna at endurskapa Big Bang, tó í minni dimensjón enn vanligt. Avleiðingarnar av royndini kennir eingin við vissu, og granskarar kunnu ikki avvísa at heimurin kann ganga undir av tí sama.

### Spentir og vónbrotnir alisfrøðingar

Alisfrøðingar kring allan heimin bíða spentir eftir tí, sum verður kallað heimsins størsta alisfrøðiroynd. Endiliga verður tað gjørligt at endurskapa Big Bang og finna útav hvat er innan í teimum bitlunum, sum vit longu kenna til. Um tað eydnast teimum at finna tann tiltikna Higgs-bitlin, hongur heimurin soleiðs saman, sum vit hava lært í alisfrøðitímunum í skúlanum. Um ikki, verða alisfrøðingar kring heimin klókari, og so mugu allar fysikbøkurnar í heiminum endurskoðast.

Men sjálvt um flestu alisfrøðingarnir hava stjørnuglans í eygunum yvir royndina, eru samstundis onnur, ið eru minni hugtikin av royndini. Summi meta enntá at royndin í prinsippinum kann viðføra heimsins enda, meðan onnur eru nøgd við at verða inniliga skuffaði av at evropeiskir politikarar hava valt at brúka 22 milliardir krónur til hesa royndina.

### Nýtt innlit í náttúrumegirnar

Sjálva royndin gongur út uppá at senda tveir streymar av bitlum hvør sín veg runt í einum ovurstórum, 27 kilometrar langum undirjarðartunnili beint við markið millum Frakland og Sveis. Teir verða akselereraðir upp til eina ferð, sum líkist ferðini á ljósinum, og tá teir møtast og renna í hvønn annan, hendir tað við ógvusligari megi.

- Orsøkin til at fólk óttast, er at menniskju ongantíð áður hava gjørt royndir við so stórari mongd av orku. Men um tað var nakar av okkum vísindafrøðingum, sum trúðu at nakar vandi var fyri heimsins undirgangi, vildu vit sjálvandi ikki gjørt royndina, greiðir Anja C. Andersen, astrofysikari frá fyri Berlingske Tidende.

Men samstundis viðgongur hon, at tey ikki kunnu leggja høvdið á blokkin og siga, at tey við vissu vita hvat fer at henda.

Orsøkin til at hon ikki trýrt einum einasta av teimum ræðumyndunum um heimsins undirgang er, at tey byggja á møguleikan fyri at eitt sokallað »Svart hol« uppstendur undir royndini. Men møguleikin fyri hesum, heldur hon er so at siga eingin, og um so var, at eitt svart hol uppstóð, vildi tað verið so lítið, at tað ikki kundi síggjast við berum eyga.

Um so er at eitt svart hol uppstendur, vil tað bara verða áhugavert fyri alisfrøðingar, tí kann geva teimum nýtt innlit í náttúrumegirnar, greiðir Anja C. Andersen frá.